

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 06 - 2012

# Norðsjóvaroljan gav 30 mia. krónur

Oljan í Norðsjónum royndist danska ríkiskassanum munandi betur í fjør enn í 2010. Nýggj tøl hjá Orkustýrinum vísa, at ríkiskassin fekk 30,6 milliardir krónur burtur úr oljuni og gassinum í Norðsjónum í 2011, og tað var 29 prosent meiri enn árið fyri, hóast tann danska oljuframleiðslan var 10 prosent minni í 2011 enn í 2010. Hinvegin hækkaði oljuprísurin 40 prosent í fjør, og tí vaks vinningurin hjá ríkiskassanum nógv, hóast framleiðslan minkaði. Í meðal kostaði ein tunna av olju 111 dollarar ella 665 krónur í fjør. Tær seinastu metingarnar hjá Orkustýrinum av oljuni og gassinum í teirri donsku undirgrundini siga, at framleiðsluavlopið verður so mikið stórt, at Danmark fer at útflyta olju og gass í tíggju ár afturat. Neyvt siga metingarnar, at danir kunnu selja útlondum olju til 2020 og gass til 2022. Orkustýrið ger vart við, at tað er í ferð við at fyrireika nýggj loyvi í vestara parti av Norðsjónum, og feløgini kunnu fáa nýggj leitiøki longu í 2013.

